# Atlantsflog flýgur framvegis høgt

*Hóast úrslitið hjá føroyska flogfelagnum minkaði við fimm milliónum til góðar átta milliónir, so er leiðsla felagsins sera væl nøgd við gongdina. – Vit fegnast um tað økta virksemi, men fáa einki gjørt við, at eitt nú oljuprísirnir hækka, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað gongur framvegis væl hjá føroyska flogfelagnum, Atlantsflog.

Í gjár kundi stjórn felagsins leggja enn ein roknskap við yvirskoti fyri nevnd og aðalfund felagsins og sum væntað, var hann eisini góðkendur.

**Stórur inntøkuvøkstur**

Hóast fallið í úrslitinum, so øktust inntøkurnar hjá føroyska flogfelagnum.

Nettosølan í fjør var góðar 130 milliónir og tað er ein øking upp á umleið 11 milliónir. Økingin stavar serliga frá, at alsamt fleiri ferðafólk brúka føroyska flogfelagið.

Í fjør øktist talið av ferðandi við Atlantsflog við 10 prosentum, og tað vil siga, at tað í fjør flugu uml. 83 túsund ferðafólk við Atlantic Airways.

Men økta virksemið hevur eisini øktan kostnað við sær, og tí eru útreiðslur felagsins eisini øktar.

Kortini er tað ikki bara økta virksemi, sum hevur størstu ávirkanina á útreiðslusíðuna. Tað hevur oljuprísurin.

Prísurin á alheims oljumarknaðinum er hækkaður sera nógv, og tað kann beinleiðis lesast av í roknskapinum hjá Atlantsflog. Góðar 91 mió. krónur vóru brúktar til flúgvikostnað í 1999 og tað er góðar 16 mió. krónur meiri enn árið frammanundan.

Magni Arge, stjóri staðfestir eisini gongdina, sum teir væntað fer at halda fram í ár.

– Vit hava broytt metingarnar fyri hetta ári, soleiðis at vit nú roknað við høgum fuelprísum alt árið, sigur Magni Arge, sum kortini væntar, at úrslitið fyri 2000 verður á leið tað sama, sum tað var í fjør.

Harafturat var flogfarið til høvuðseftirlit í fjør, og tað er eisini ein beinleiðis orsøk til hægru útreiðslurnar

**Eginognin um at koma í rættlag**

Tey, sum hava fylgt eitt sindur við í søguni hjá Atlantsflog, vita, at tey fyrstu árini felagið virkaði, vóru fíggjarliga tung.

Fleiri ár við undirskoti gjørdi, at meiri enn helmingurin av partapeninginum var mistur. Í 1995 var eginognin umleið 30 milliónir krónur, men síðani hevur gingið stútt framá.

Við avlopinum fyri 1999 er eginognin komin upp á slakar 65 milliónir krónur og tað merkir, at fær Atlantsflog eitt ársúrslit, sum er eitt sindur betri enn tað var í 1999, so er allur partapeningurin vunnin innaftur.

Men við metingunum hjá stjóranum í huga, so skulu vit ikki rokna við, at hetta hendir eftir bert einum ári.

Hann væntar nevniliga ikki, at úrslitið verður nógv betri enn tað var í fjør.

**Ikki útreiðsla fyri felagið**

Í februar mánaði varð flotin hjá Atlantsflog tvífaldaður. Felagið keypti eitt nýtt flogfar, sum á Føroyaleiðini serliga skal brúkast um summarið, meðan tað verður leigað út restina av árinum.

Men hóast felagið hevur økt um flotan - og harvið eisini um lánibyrðu felagsins - so roknar stjórin ikki við, at tað fcr at síggjast aftur á rakstrarúrlitinum.

– Gongur sum ætlað, so gera vit ein leigusáttmála við BM Commuter, sum leigar flogfarið nú, og hann fer at hava við sær, at flogfarið ikki kemur at tyngja raksturin. Teir leiga flogfarið í níggju mánaðir, men inntøkurnar vit fáa burturúr tí svara til tað, sum tað kostar okkum at hava flogfarið í 12 mánaðir, sigur Magni.

Nýggja flogfarið, sum kostaði góðar 50 milliónir krónur hevur sjálvsagt økt um lánibyrðu felagsins, sum undan keypinum var komin niður á góðar 28 milliónir.

– Vit hava fíggjað keypið við láni upp á uml. 38 milliónir, meðan felagið hevur goldið restina. Tað svarar til góðar 15 milliónir, sigur Magni Arge, sum leggur afturat, at av somu orsøk er tøki peningurin, sum við árslok var knappliga 24 milliónir, væl lægri nú.

**Hyggja at prísunum**

Evnið, sum hevur verið tosað um seinastu dagarnar, er hvørt prísirnir skulu lækkast til 1.000-1.200 krónur ella ikki.

Kappingarneytin hjá Atlantsflog, Maersk, hevur biðið um loyvið, at lækkað prísirnar, men enn er loyvið ikki givið.

Magni Arge hevur fýlst á, at Maersk finnur upp á slíkt, tí talan er um misjavna kapping, sigur hann.

– Skulu prísirnir á Føroyarutuni lækkast fyri at fáa rættvísari kapping, so skulu vit eisini hava atgongd til hinar marknaðirnar hjá teimum, soleiðis at vit kunnu kappast har, sigur hann.

Vit spurdu Magna, um Atlantsflog ætlar sær at lækka prísirnar samsvarandi tí hugskoti, sum Maersk hevur, men tað vil hann ikki taka støðu til í løtuni.

– Vit fara at hyggja at prísunum, men enn hava vit onga avgerð tikið, sigur hann.


STH
teldu · 31 65 11

ASSERTIÓN
27. apríl, 1-4-8 mai kl.16.00-20.00

Assertión
er frálík, um tú vilt vita meira um títt egna virði og sjálvsvirði. Tú kanst læra at gerast betri til bæði at loysa ósemjur, stríð og trupulleikar bæði til arbeiðis og heima.

Innihald
Á skeiðnum lærir tú um assertiónsástøði, um grundleggjandi rættindi
- um at seta krøv og avísa krøv, um kennslur og virði, um kroppsmál
- um føgur orð, at finnast at og taka ímóti atfinningum, um hvussu tú umsitur títt vald og sjálvsvirði.

Málbólkur
Skeiðið er ætlað starvsfólki og leiðarum í privatum og almennum fyritøkum, ið ynskja persónliga menning og hava hug at arbeiða við broytingum og nýhugsan.

Skeiðleiðari: Bergur Godtfred
Kostnaður: Kr. 2.400,00 íroknað frálæru, tilfar og mat.
Tilmelding: Í seinasta lagi 18. apríl 2000

*Skeiðini verða hildin treytað av at nóg nógvir luttakarar tekna seg. Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til*

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn
Tel: 318813, Fax: 313374, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo



STH
teldu · 31 65 11

Word framhaldsskeið
Skeið til stóra teldukoyrikortið
2-4-9-11 mai kl.09.00-14.30

Innihald
- fílhandafaring
- at arbeiða við fleiri skjølum ísenn
- tekstteigar
- skabelónir
- flyting av teigum
- flætting av dátugrunni
- serstakir tabulatorar
- standardbrøv
- brúk av skema
- síðuhøvd og síðufótur
- fjølvar (makro)
- at seta inn slóðir (hyperlinks), bókamerki, undirgreinir

Skeiðið er ætlað teimum, ið hava brúk fyri framkomnum hentleikum í Word.
Treyt fyri at fara til próvtøku, er, at tú hevur staðið royndina í tí vanliga teldukoyrikortinum.

Skeiðleiðari: Martha Dalsgaard
Kostnaður: Kr. 3.600,00 íroknað frálæru, tilfar og mat.
Tilmelding: Í seinasta lagi 26. apríl 2000

*Skeiðini verða hildin treytað av at nóg nógvir luttakarar tekna seg. Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til*

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn
Tel: 318813, Fax: 313374, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo





GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Skjót levering
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo



www.tusund.fo
1000 ára haldið
Frá 1000 ára haldinum

**Leygardagin 15. apríl kl. 16.00** heldur Inga Poulsen Dam, prestur fyrilestur "Er kirkjan føroysk" í Selatra›ar kirkju. – Kristiliga Sangkóri› syngur.

**Leygardagin 15. apríl kl. 16.00** lesur Elsa Funding, prestur fyrilestur hjá Axel Tórgar› um Petter Dass í dupultstovuni í Tvøroyrar Skúla . Tórshavnar Manskór syngur.

**Leygardagin 15. apríl kl. 16.00** heldur David Johannesen, prestur fyrilestur um Martin Luther í Glæmuni í Kvívík.

**Leygardagin 15. apríl kl. 16.00** ver›ur konsert vi› Føroya Symfoniorkestri í Christianskirkjuni í Klaksvík. Stabar Matas – Solistar: Elsba S. Dalsgar› og Daisy Johannesen.

**Sunnudagin 16. apríl kl. 15.00** ver›ur konsert vi› Føroya Symfoniorkestri í Gøtu kirkju. Stabar Matas – Solistar: Elsba S. Dalsgar› og Daisy Johannesen.

**Sunnudagin 16. apríl kl. 19.30** ver›ur konsert vi› Føroya Symfoniorkestri í Vesturkirkjuni. Staber Matas - Solistar: Elsba S. Dalsgar› og Daisy Johannesen.

RZ013



Framsýning 2000

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli og Listaskúlin hava framsýning í
Eysturskúlanum & Veviskúlanum
Tórsgøta 5
Leygardagin 15. apríl kl. 14.00 – 19.00
Sunnudagin 16. apríl kl. 14.00 – 19.00

Eisini verður tónleikur og kórsangur

Eysturskúlin

Leygardagin:

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 14.00 Framsýning verður sett av: | | Leivuri Hansen |
| Kl. 14.10 Barnakór syngur | Lærarar: | Sigrid Sivertsen, Malan Thomsen |
| Kl. 15.00 GHM– harmoniorkestur | Lærarar: | Atli Petersen, Kenneth Jones |
| Kl. 16.00 Kamarkórið | Lærari: | Hans Pauli Tórgarð |
| Kl. 17.00 Jassarnir | Lærari: | Brandur Øssursson |
| Kl. 18.15 Guittarkvartettin | Lærari: | Bo Isholm |

Sunnudagin:

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 15.00 Havnar Hornorkestur | Lærarar: | Kenneth Jones, Ove Olsen |
| Kl. 16.00 Barnakóri syngur | Lærarar: | Sigrid Sivertsen, Malan Thomsen |
| Kl. 17.00 Aurora Borealis | Lærari: | Ólavur Jøkladal |

Høvi verður at keypa kaffi og køkur



Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli



Kularrøtur @ Kambsdali

Leygardagin kl. 17.00 kann øll familjan fara til stórt tiltak á Kambsdali.



Kulir sangir, dansigentir og myndashow.
Absalon Áargarð og stuttligu dukkudreingirnir Fjaðrarok og Nikláí.
Føroyskar barnastjørnur, sum syngja og spæla uppá ljóðføri.
Og Trølla Pætur verður har...... næstan øll vera har!

Atgongumerki á 65 krónur fáast í forsølu á Statoil í Havn, Saltangará, Skálabotni, Leirvík og í Klaksvík.

KULARRØTUR eisini á heimasíðuni:
www.pegasus.fo



PEN-TELD
Vit vera at hitta á **bás 9** á sølustevnuni við:
Pen-teldum, Fujitsu-Siemens teldum, HP o.ø.
Kom og vitja, okur bíða bara eftir tær…
WWW.PENTELD.COM



www.wenzel.fo
Ford





PRENT?
…nýggjasta tøknin og gott handverk geva besta úrslitið…
Spf.
HESTPRENT
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo



Stillads
Forskalling
Er ætlan at keypa ella leiga:
- Forskalling og tilhoyr
- Forskallingsolja & sproytur, klams, konus, avstandsrør v.m.
- Facadestillads
- Trygdarrækverk
- Aluminium rullustillads
- Arbeiðsplatformar

THYSSENKRUPP -HÜNNEBECK
*Leverandørurin til Føroysk byggivirkir í 28 ár*
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820